


*Politisk protektionisma er orsøkin til, at dataskráir, sum eru goymdar her á Elektron, ikki eru tøkar hjá útlendskum teldufyritøkum, sum kundu økt um tænastustøðið í Føroyum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Politiskur málsetningur: Protektionisma

**Forboðið ímóti útflutningi av teldutøkum persónsupplýsingum hevur fyrst og fremst til endamáls at hjúkla um eina ikki kappingarføra edv-vinnu í Føroyum. Tað skrivar rættarnevndin í áliti til Løgtingið**

PROTEKTIONISMA
*Jóanes N. Dalsgaard*

Seinasta vár viðgjørdi Løgtingið eitt lógaruppskot um viðgerð av persónsupplýsingum. Sum vant, tá Løgtingið viðger lógaruppskot, varð málið beint í nevnd. Í hesum førinum var tað rættarnevndin, sum fekk málið til viðgerðar. Rættarnevndin skrivaði álit í málinum, og í álitinum stendur m.a. at lesa, hví rættarnevndin heldur lógaruppskotið vera gott. Í álitinum stendur m.a., at rættarnevndin frá landsstýrismanninum í lógarmálum hevur fingið upplýst, at lógin er orðað við tí fyri eyga, at "fyribyrgja, at eitt nú peningastovnarnir flyta sítt edv-samskifti av landinum". Rættarnevndin tekur undir við hesum endamálið, men er eitt sindur ivasom, hvørt hetta eigur at framganga alt ov klárt av lógini. Rættarnevndin mælir í staðin landsstýrismanninum til, við kunngerð, at steðga ella avmarka útflutning av persónsupplýsingum til útlond. Hvat málið skal vera við hesi kunngerð framgongur heilt greitt av álitinum: "Rættarnevndin mælir til, at henda kunngerð kemur at fata um júst spurningin um at steðga útflutningi av persónsupplýsingum peningastovnana". Víðari stendur í álitinum, at rættarnevndin "við hesum broytingum heldur...at...politiski málsetningurin at fyribyrgja, at peningastovnarnir flyta sítt edv-samstarv av landinum, er rokkin".

Landsstýrismaðurin aktaði áheitanina frá rættarnevndini, og í desember í fjør, kom ein kunngerð, sum setur bann ímóti øllum útflutningi av teldutøkum persónsupplýsingum. Dátueftirlitið, sum er tann myndugleikin, ið skal tryggja, at kunngerðin verður fylgd, tók herfyri avgerð um at steðga einum samstarvið ímillum eina føroyska fyritøku og danska edv-virkið PBS. Avgerðin hevur heimild í kunngerðini frá desember í fjør.

Seinastu dagarnar er komið fram, at avgerðin hjá dátueftirlitinum kann fáa víðfevndar avleiðingar fyri føroyingar. Stjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen hevur sagt, at avgerðin hjá dátueftirlitinum helst ber í sær, at nýtsla av gjalds- og kritkortum ikki verður ein møguleiki í Føroyum í framtíðini.

Forkvinnan í dátueftirlitinum Turið Debes Hentze advokatur hevur heldur ikki besta skoðsmál at geva lógini um viðgerð av persónsupplýsingum. Hon hevur sjálv verið við til at seta bann ímóti áðurnevnda samstarvi ímillum føroyska fyritøku og PBS. Men hon heldur tað vera óheppi at lógin hevur eitt so snævurt og ítøkligt endamál, sum tað er, at forða PBS at virka í Føroyum.

Heldur ikki Kappingarráðið er fegið um lóggávu, sum tarnar kapping ímillum føroyskar og útlendskar tænastuveitarar. Men Heri Joensen fulltrúi á Kappingarráðnum sigur, at Kappingarráðið onga heimild hevur til at seta krøv mótvegis Løgtingi og Landsstýri. Vil Løgtingið samtykkja kappingaravmarkandi lógir, ella vil Landsstýrið gera kappingaravmarkandi kunngerðir, so kann Kappingarráðið ikki gera annað enn at vísa á, at talan er um kappingaravmarking.

Spurningurin, sum stendur eftir er, hví Løgtingið fyrst samtykkir eina kappingarlóg, sum skal tryggja fría kapping í føroyska vinnulívinum, fyri síðani at samtykkja eina lóg, sum forðar føroyska vinnulívinum at keypa sínar tænastur har, tær eru bíligast.

Allir flokkar á Tingið, uttan Miðflokkurin, atkvøddu fyri lógini við tí protektionistiska málsetninginum. Miðflokkurin atkvøddi ímóti, tí at tey hildu lógina vera í linara lagi.

# Løgtingið í stríð við seg sjálvt

**Hóast Løgtingið fyri fleiri árum síðani samtykti eina kappingarlóg, at tryggja fría kapping í føroyska vinnulívinum, hevur Løgtingið nú samtykt eina lóg, sum í stóran mun avmarkar hesa somu kapping**

PROTEKTIONISMA
*Jóanes N. Dalsgaard*



*Heri Joensen, fulltrúi á Kappingarráðnum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tá Løgtingið seinasta vár samtykti lóg um viðgerð av persónsupplýsingum, fekk Landsstýrið heimild til at avmarka kappingarmøguleikarnar hjá føroyska vinnulívinum. Og í sambandi við løgtingsviðgerðina av lógini heitti rættarnevndin hjá Løgtinginum staðiliga á landsstýrismannin í lógarmálum um at nýta hesa heimild. Aftan fyri áheitanina frá rættarnenvdini lá ein politiskur málsetningur um, at forða føroyskum peningastovnum í, at keypa tænastur frá donsku edv-fyritøkuni PBS. Landsstýrismaðurin aktaði rættarnevndina, og beint fyri jól í fjør, kom ein kunngerð, sum bannaði øllum útflutningi av elektroniskt goymdum persónsupplýsingum.

Kunngerðin, og lógin aftan fyri hana, forða føroyskum stovum og fyritøkum í at keypa ávísar tænastur uttanlands. Talan er um allar tænastur, sum á einhvønn hátt umfata viðgerð av persónligum upplýsingum í teldutøkum líki. Slíkar tænastur skulu hereftir veitast í Føroyum. Hetta merkir t.d, at fyritøkur í Føroyum ikki kunnu keypa vanligar bókhaldstænastur frá donskum bókhaldsvirkjum. Um danska bókhaldsvirkið eitt nú skal átaka sær at gera rokningar klárar fyri føroysku fyritøkuna má bókhaldsvirkið vita, hvat viðskiftafólk hjá føroysku fyritøkuni skylda. Men tá hetta eru persónligar upplýsingar, mugu tær ikki sendast danska bókhaldsvirkinum í teldutøkum líki. Hetta merkir í veruleikanum, at marknaðurin fyri bókhaldsveitingar í Føroyum er ein vardur marknaður.

Sosialurin hevur vent sær til Kappingarráðið at vita, hvussu tílík kappingaravmarking sampakkar við endamál og anda í kappingarlógini. Heri Joensen fulltrúi í Kappingarráðnum kann ikki úttala seg um tað ítøkiliga málið, tí Kappingarráðið hevur ikki havt tað til viðgerðar. Men trupulleikan kennir hann aftur.

- Tað er so nógv lóggáva, sum stríðir ímóti kappingarlógini. Men Kappingarráðið hevur onga heimild til at áleggja øðrum myndugleikum, t.d. Landsstýrinum, at fylgja kappingarlógini. Tað, sum Kappingarráðið kann gera, er at gera avvarðandi myndugleikar varugar við lóggávu, sum ikki er í samsvar við kappingarlógina. Í slíkum førum heitir Kappingarráðið á myndugleikan, um at hava neyðugar rættingar í huga, tá lóggávan einaferð skal endurskoðast.

- Er eingin mannagongd, sum kann forða fyri, at lógir vera gjørdar, sum stríða ímóti kappingarlógini?

- Kappingarráðið fær ofta lógaruppskot til hoyringar, um ivamál eru hvørt uppskotið er í andsøgn til kappingarlógina. Men tað hendir minni enn so altíð. Tað hendir meira enn so, at lógarsmíð fer fram, sum er kappingaravmarkandi, uttan at Kappingarráðið veit nakað um málið, fyrrenn lógin er samtykt. Tá er so einki annað hjá Kappingarráðnum at gera, enn at venda sær til tann myndugleikan, sum umsitir lógina, og vísa á trupulleikan. So hevur myndugleikin møguleika fyri, at fáa kappingaravmarkingarnar burtur, næstu ferð lógin skal broytast.

Kappingarráðið hevur, sum nevnt, ikki viðgjørt hetta ítøkiliga málið. Tí kann Heri Joensen ikki siga um, ella í hvønn mun, lógin um viðgerð av persónsupplýsingum er kappingaravmarkandi. Men ein forðan fyri samhandli við útheimin er altíð ivasom sæð frá einum kappingarsjónamiði.

- Sum heild kann sigast, at tá tú verjir føroyska vinnu uppá ymsar mátar, so er tað til meira skaða enn gagn. Um tú verjir eina vinnu, sum ikki er kappingarfør, so tekur tú kapital og arbeiðsmegi úr kappingarførari vinnu. Varda vinnan kemur soleiðis at leggja trýst á kappingarføru vinnuna og úrslitið er, at samlaða kappingarførið versnar. Tað hevði verið betri at nýtt kapital og arbeiðsmegi har, sum vinnan er effektiv, og so keypt aðrar vørur og tænastur úr útlondum, sigur Heri Joensen at enda.

# Rokningin skal vera føroysk

**Forkvinnan í dátueftirlitinum, Turid D. Hentze, sakførari, heldur at lógin um viðgerð av persónsupplýsingum er óneyðuga ógreið, og at henda ógreiða m.a. stendst av, at lóggávan verður nýtt til at náa ov ítøkiligum politiskum málum**

PROTEKTIONISMA
*Jóanes N. Dalsgaard*



*Turid D. Hentze, formaður í Dataeftirlitinum*

Rokningin skal vera føroysk. Hetta er dátueftirlitið komið til eftir at fólk í Føroyum hava fingið sendandi rokningar frá donsku PBS skipanini.

Niðurstøðan hjá dátueftirlitinum byggir á eina kunngerð frá desembur í 2001, har landsstýrismaðurin í lógarmálum hevur ásett, at elektroniskt goymdir persónsupplýsingar ikki mugu flytast av landinum. Hetta merkir, at føroyskir stovnar ella fyritøkur ikki hava loyvi til at senda PBS upplýsingar um viðskiftafólk síni. Treytin fyri at PBS kann skriva rokningar út fyri føroyskar fyritøkur er sjálvandi, at PBS veit, hvat viðskiftafólkini skylda. Men hesar upplýsingar hava føroysku fyritøkurnar, sambært kunngerðini, ikki loyvið til at senda PBS í Danmark.

PBS stendur fyri Pengeinstitutternes Betalings Service. Talan er um eitt móðirfelag við 8 dóttirfeløgum. Tað eru donsku peningastovnarnir, sum eiga PBS, men stovnurin samstarvar við peningastovnar um allan heim.

Í Føroyum finst ein líknandi fyritøka, sum eitur Elektron. Eisini Elektron hevur fleiri eigarar. Men meðan PBS er ein burturav privat fyritøka, so er tað Føroya Landsstýrið, sum eigur Elektron, saman við m.ø. Føroya Banka og Føroya Sparikassa.

Í sambandi við avgerðina hjá dátueftirlitinum hevur Jørn Astrup Hansen nevndarformaður í P/F Elektron og stjóri í Føroya Banka sagt, at avgerðin fer at hava víðfevndar avleiðingar fyri føroyingar. Í samrøðu við Útvarp Føroya segði Astrup Hansen, at avgerðin helst kom at bera í sær, at føroyingar ikki longur sleppa at nýta gjaldskort og kritkort, so sum FR/Visa-kort og Eurocard. Tí, sigur Astrup Hansen, tá vit nýta tílík gjalds- ella kritkort, so verða persónsupplýsingar sendar av landinum, og tað er jú sambært áðurnevndu kunngerð ólógligt.

Turið Debes Hentze advokatur er forkvinna í dátueftirlitinum. Sosialurin hevur vent sær til hennara at spyrja, hvørt hon er samd við tulkingini hjá Jørn Astrup Hansen viðvíkjandi møguleikanum at nýta gjalds- og kritkort í framtíðini

- Dátueftirlitið hevur ikki viðgjørt tann spurningin, og eg kann tí ikki svara, hvørja støðu dátueftirlitið hevur til tann dátuútflutning, sum er í sambandi við nýtslu av gjalds- og kritkortum, sigur forkvinnan í dátueftirlitinum.

Í kunngerðini stendur, at forboðið ímóti útflutningi av persónsupplýsingum ikki fevnir um "staknýtarskipanir, ið bert eru ætlaðar til egna nýtslu". Vit spurdu Turið Debes Hentze, um "staknýtaraskipanir" eisini fevna um eitt nú nýtslu av gjaldskorti.

- Tað er ikki greitt hvat meinast við staknýtaraskipanir. Kanska er talan um heimabankaskipanir o.tl., men dátueftirlitið hevur ikki tulka henda partin av kunngerðini enn, so eg fái ikki komið tí nærri.

Forkvinnan í dátueftirlitinum dylir annars ikki fyri, at hon heldur lítið um lóggávuna aftanfyri umrøddu kunngerðina.

- Tá lóggávan verður ov málrætta og spesifik verður hon ring at umsita. Lógin um viðgerð av persónsupplýsingum hevur fyrst og fremst til endamáls at forða PBS í at kappast á føroyska marknaðinum. Lesur man álitið frá rættarnevndini er tað heilt týðuligt, at tað er orsøkin til, at man hevur gjørt lógina.

- Sigur tú harvið, at lógin um viðgerð av persónsupplýsingum hevur eitt protektionistiskt endamál?

- Man kann bara lesa tað, sum stendur í álitinum frá rættarnevndini, sigur Turið Debes Hentze at enda.